# Børge tekur ímóti Anfinni

*Formaðurin og aðalskrivarin í Fótbóltssambandinum vera í Hollandi, tá finalurnar í steypakappingunum verða spældar*

Komandi sunnudag vera finalurnar í steypakappingini hjá kvinnum og monnum. Finalan í kvinnukappingini, sum er endurtøka av finaluni í fjør millum HB og KÍ, verður spæld á ovara vølli í Gundadali klokkan 12.30. Tað verður Óli Holm, nevndarlimur í FSF, sum fer at handa vinnandi liðnum gullkrónur og tapandi liðnum silvur krónur. Steypið, sum HB hevur havt í varðveitslu síðani í fjør, skal Leivur Hansen, býráðsformaður í Havnini, handað vinnandi liðnum.

At dysturin er lagdur at vera so tíðliga á degnum kemst av, at kvinnufinalan og finalan um løgmanssteypið verða spældar á hvør sínum vølli. Í FSF hava teir viljað byrgt fyri møguleikanum, at kvinnudysturin ikki verður liðugur, tá mansfinalan er ásett at vera – klokkan 15. Um talan verður um longda leiktíð og brotssparkskapping í kvinnufinaluni, so ber til at ímynda sær, at dysturin verður í meiri enn tveir tímar.

Finalan um løgmanssteypið verður á Tórsvølli sunnudagin klokkan 15. HB og GÍ skulu spæla, og løgmaður fer at handa vinnandi liðnum gullkrónur og steyp.

Men tað verður ikki – sum tað plagar at vera – formaðurin í FSF, sum verður vertur hjá løgmanni. Í vikuni fara Torleif Sigurðsson og Ísak Mikladal, aðalskrivari í FSF, til Hollands á fund hjá UEFA. Tað er vanligt at UEFA leggur ársaðalfundin at vera, tá stóru finalurnar verða spældar, og soleiðis er tað eisini hesa ferð. Tað vil við øðrum orðum siga, at meðan Børge B. Hansen, næstformaður í FSF tekur ímóti Anfinni Kallsberg, løgmanni, so fara Torleif Sigurðsson og Ísak Mikladal at gera seg klárar at fara at síggja EM finaluna í Hollandi.


*Torleif Sigurðsson, verður í Hollandi, tá finalan um løgmanssteypið skal spælast*

Børge B. Hansen skal handa tapandi finaluliðnum silvurkrónur og dómarabólkinum heiðurskrónur. Løgmaður skal handa vinnandi liðnum løgmanssteypið, og næstformaðurin í FSF skal handa gullkrónurnar.

Tá vit spurdu okkum fyri í gjár var ikki avgjørt, hvør skal døma í teimum báðum finalunum, sum sunnudagin vera í Gundadali.

Hóskvøldið skulu HB og NSÍ spæla finalu í steypakappingini hjá unglingum. Dysturin verður á Mølin i á Eiði, og fyrsta bríkslið verður klokkan 19.00. Dánjal Andreasen, nevndarlimur í FSF, skal handa steypið hjá Thomas Dam & co.

# Leiftur framvegis í Europa

*John Petersern skoraði, og ein móstøðumaður var rikin av vølli fyri at sparka føroyska landsliðsmannin*

Vónirnar vóru kanska ikki tær bjartastu, tá eitt av føroysku liðunum í íslendskum fótbólti, Leiftur, leygardagin fór til Sveis at spæla seinna dystin í fyrsta umfarinum í Intertoto Cup.

Úrslitið var 4–4, og tá dysturin í Ólafsfirði endaði 2–2, vísti samantalda úrslitið, at tað verður Leiftur og ikki Luzern, sum fer at halda fram í Intertoto Cup.

Longu komandi vikuskifti skal Leiftur aftur spæla í intertoto Cup. Tá skulu teir hitta Sedan úr Fraklandi. Hetta liðið endaði i fjør á sætta plássi í bestu deildini, og tað verður mett, at liðið eigur góða framtíð. Á heimavøllinum hjá teimum rúmast seytjan túsund áskoðarar, og í miðal møta fjúrtan túsund til landskappingardystirnar. Ivasamt man kotini vera, um so mangir áskoðarar fara at møta upp at hyggja at Intertoto Cup, sum ikki verður mett serliga høgt í Europa.

**John skoraði**

Tað sá einki serligt út hjá Leiftri leygardagin. Allir fýra føroyingarnar – Jens Martin Knudsen, Sámal Joensen, John Petersen og Jens Erik Rasmussen – vóru á vøllinum í Sveis, tá heimaliðið setti hol á málskjótingina. Leiftur javnaði, og hóast ein av heimamonnunum varð rikin av vølli, tí hann hevði sparkað John Petersen í høvdið, so megnaði Luzern at økja bæði til 2–1 og 3–1. John Petersen minkaði um munin til 3–2, og tá Leiftur javnaði til 3–3, var íslendska liðið komið víðari í kappingini.

Men sjey minuttir fyri leiklok var aftur galið hjá Leiftri. Sveisiska liðið legði seg á odda 4–3, og alt tóktist benda á, at Leiftur var sent úr Intertoto Cup. Men sveisararnir mundu vera ov seinir at fáa hendurnar niður aftur. Ella kanska var tað tí, at venjingarstøðan hjá íslendska liðnum er væl betri, enn hon er hjá sveisarunum, sum ikki havva spælt í landskappingini í meiri enn ein mánaða. Leiftur javnaði til 4–4, og sjálvsagt vóru teir væl nøgdir, tá dómarin bríkslaði fyri síðstu ferð.

**Landskappingin**

Leiftur átti at havt spælt á Leikardalsvøllinum í Reykjavík í vikuskiftinum. Men av tí at teir vóru í Sveis, varð útidysturin móti Fram útsettur. Hann verður spældur hósdagin 13. juli. So vita fótbóltshugaðir føroyingar, sum um ta tíðina vera staddir í íslendska høvuðsstaðnum, tað.

Felagið hjá Allani Mørkøre, ÍBV, hevði í vikuskiftinum heimavøll móti oddaliðnum KR úr Reykjavík.

Úrslitið av fyrsta dystinum í áttanda leikumfari var 1–1. Bæði málini vórðu skorað í 1. hálvleiki, og í báðum førunum var talan um brotsspark. ÍA kom á odda, tá ein hálvur tími var farin, og ÍBV javnaði átta minuttir seinni.

Hinir dystirnir í áttanda leikumfarinum vórðu spældir í gjárkvøldið. KR er á odda við fimtan stigum, og ÍBV er á fimta plássi við ellivu stigum.

**Gott lutakast**

Í Íslandi eru teir væl nøgdir við lutakastið til Europa Cup. Felags fyri liðið hjá Allani Mørkøre, ÍBV, og liðið hjá Una Arge, ÍA, skulu bæði spæla móti vestureuropeiskum liðum, og í báðum førum er talan um mótstøðulið, sum íslendsku liðini vera mett at hava møguleika ímóti.

ÍA úr Akranesi skal spæla móti belgiska Gent, og ÍBV skal spæla móti skotska Hearts. Bæði tey íslendsku liðini skulu spæla á útivølli fyrst.

JH


*Vónandi er Julian komin fyri seg, tá Danmark kemur á vitjan*

# Hans Fróði aftur í eldinum

*Verjuspælarin avloysti sunnukvøldið Julian Johnsson, sum noyddist at gevast, tí hann var skaddur*

Hans Frøoði Hansen hevur verið ótolin, nú hann í fleiri vikur hevur sitið á beinkinum í Sogndal. Tað hevur ikki verið at undrast á, tí landsliðsmaðurin valdi at fara út um landoddarnar at spæla fyri at royna, hvussu langt hann kundi koma sum fótbóltsspælari. Og hann hevur verið væl vitandi um, at talan so at siga var um eina endastøð, um hann framhaldandi fór at hita beinkin hjá Sogndal.

Sunnukvøldið slapp Hans Fróði Hansen, sum síðani hann kom fyri seg eftir triðja óstbeinabrotið bara hevur spælt við næstfremsta liðnum í Sogndal, framat aftur.

Sjálvandi hevði Hans Fróði ynskst, at hann skuldi sleppa framat á ein annan hátt, enn hann gjørdi, men umstøðurnar løgdu tað soleiðis hesa ferð, at hann fekk møguleikan at spæla allan seinna hálvleik. Julian Johnsson hevði verið á miðvøllinum í 1. hálvleiki, men hann noyddist at taka seg úr dystinum, tí hann var skaddur.

Í norsku bløðunum fær Hans Fróði Hansen hampuligt skoðsmál fyri sítt avrik. Longu í gjárkvøldið skuldi Sogndal spæla aftur, og í blaðnum í morgin fara vit at frætta, um Hans Fróði slapp framat eina ferð afturat.

Kurt Mørkøre spældi allar 90 minuttirnar á heimavøllinum, sum eitur Fosshaugamstadion. 775 áskoðarar hugdu at, og teir frøddust um, at Tommy Øre longu í 7. minutti var so mikið leysur í brotsteiginum, at hann hevði tíð at temja innlegginum, áðrenn hann skoraði einasta málið í dystinum.

Tað var trupult hjá Sogndal móti Raufoss. Liðformaðurin, Dag Christian Sørensen, var ikki á miðvøllinum, og tá Julian Johnsson ikki var við í 2. hálvleiki, gekk tað út yvir miðvallarspælið.

Í 2. hálvleiki vardi Sogndal teptu leiðsluna, og tað eydnaðist teimum til fulnar. Longu í gjárkvøldið skuldi Sogndal aftur í eldin. Talan var um útsettan heimadyst móti Ryåsen. Dysturin skuldi havt verið spældur í 7. umfari.

Flestu liðini í næstbestu norsku deildini hava spælt tólv dystir. Sogndal spældi sín tólvta dyst í gjárkvøldið. Undan tí dystinum var Sogndal á fjórða plássi. Teir hava 20 stig. Raufoss, sum teir vunnu á sunnukvøldið, er á fimta plássi, og Byåsen, sum teir spældu ímóti í gjárkvøldið, er á áttanda plássi. Um Sogndal fekk fulla úrtøku í gjárkvøldið, so fóru teir framum gamla felagið hjá Juliani Johnsson, Kongsvinger, sum hevur 22 stig.

Kortini er langt upp til fremstu plássini og harvið møguleikan fyri uppflyting. Lyn hevur á fremsta plássinum 31 stig, og Strømgodset hevur á øðrum plássi 27 stig.

Í næstbestu norsku deildini kenna teir lítið til summarfrí. Sogndal skal spæla aftur komandi sunnudag. Annan sunnudag halda teir frí, men longu mitt í juli skulu teir aftur í eldin, og so verður ikki helmað í fyrrenn kappingin verður liðug í heyst.

JH



## MINNINGARGRUNNUR DÁNJAL NICLASEN

Við hesum verður sagt frá, at umsóknir fyri 2000 um stuðul úr Minningargrunni Dánjal Niclasen eiga at vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin hin 20. juli 2000.

Umsóknarblað fæst við at seta seg í samband við Fiskasøluna, tel. nr. 345345, og verður at senda til nevndina í Minningargrunni Dánjal Niclasen:

**Minningargrunnur Dánjal Niclasen**
**c/o Føroya Fiskasøla**
**Mykinesgøta 5**
**FO-100 Tórshavn**
**Att.: Hans Johannes á Brúgv, nevndarformaður**

*Endamálið við Minningargrunni Dánjal Niclasen er at stuðla ungum føroyingum, ið vilja útvega sær víðari útbúgving innanfyri føroyska fiskivinnu, eitt nú hvat viðvíkur:*

1. *Kanning av fiskiskapi uttanfyri Føroyar, sum kann bera í sær nýggjar veiðuheittir ella veiðu av fiskasløgum, ið ikki hava verið vanlig í Føroyum.*
2. *Víðari útbúgving, ið hevur við viðgerð og góðsking av fiski og fiskavørum at gera.*
3. *Marknaðarkanningar til frama fyri føroyska fiskivinnu.*
4. *Serútbúgving i handils- og fíggjarviðurskiftum, sum hava við fiskivinnu at gera.*

INPACT INTERNATIONAL

## Almenn móttøka

Í sambandi við at



**Jógvan Sundstein**

gevst tann 1. juli 2000 sum stjóri í P/F Grannskoðaravirkinum INPACT, bjóða vit til móttøku á Hotel Hafnia Hósdagin 29. juni 2000 frá kl. 15.00 til 17.00

**P/F Grannskoðaravirkið *INPACT***
statsaut. revisorar

## Strandar Skúli

Søkt verður eftir 1 lærara fyri skúlaárið 2000/2001.

Umsøkjarar, sum kunnu undirvísa í dreingjafimleiki, hava fyrimun.

Starvið, sum er tíðaravmarkað fyri skúlaárið 2000/2001, verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið.

Umsóknir skulu vera skúlanevndini í hendi í seinasta lagi 11. juli 2000.

**Sjóvar skúlanevnd**
Mass Djurhuus
494 Innan Glyvur




**Stóra bringu -ella lítla?**

**Visti tú at 80% av øllum kvinnum ganga í skeivari BH-stødd?**

**Vælkomin inn á gólvið hjá okkum og vit hjálpa og vegleiða tær at finna júst tína stødd. Ring til okkum og avtala tíð.**

**Vit hava BH í støddum úr 65 til 110 cm. í ummáli, og frá AA til H skál.**

siri liv & heilsa

Dr. Jacobsensgøta 18 • 100 Tórshavn • Tel./Fax 316610

Sosialurin - 311820

**TVINGSILSSØLA**

**Hósdagin tann 3. august 2000 kl. 09.00** verður á dómaraskrivstovuni C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir **matr. nr. 36 ai, Oyri.**

Ognin er eini sethús 100 m² til støddar í kjallara, stovu- og loftshædd. Húsini eru gjørd úr timbri og takt við aluminium. Kjallarin er ikki innrættaður. Stovuhædd: Gongd, grovkøkur, køkur, stova, hjúnarúm, kamar og baðiverilsi. Loft: Ikki innrættað. Húsini eru í hampuliga góðum standi. Onki gjørt liðugt rundanum. Byggiár ca. 1992. Grundøkið er 594 m² til støddar.

Sølan er umbiðin av **Ólavi Jákupi Kristoffersen, advokati, Fr. Petersensgøtu 9, Tórshavn, tlf. 311145 (j. nr. 20000159),** sum kann geva nærri upplýsingar, og sum nærri avtala kann gerast við, um ynskt verður at síggja ognina.

**Føroya Fútarættur,**
*tann 22. juni 2000*

máling & gólv
SUMMAR TILBOÐ
Stormshield 1. floks betongmáling 10 ltr. BERT 499,-
Johnstone's træverja timbershield 5 ltr. BERT 399,-
Reyð rustverjandi takmáling 5 ltr. BERT 299,-
máling & gólv
Við Landavegin • Tórshavn
Tel. 31 60 66

## Bilur við skaða til sølu

**Merki:** Opel Astra 2,0 DL 16V Diesel, aut. gear
**Árg.:** 1999
**KM:** 18645

Bilurin verður seldur, sum hann stendur nú, og kann síggjast á bilverkstaðnum hjá Hans Berg Hammer, Stangavegur, 700 Klaksvík.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
tlf. 456190 - fartelefon 286595
fax nr. 456527

Ólavur Samson

Trygdarskógvar
Trygdarstivlar
Trygdarmaskur
Oyravernd o.a.
Tórshavnar Maskinhandil
v/ Tummas Andreasen
Varðagøta 29-30 - Tlf. 313442

sosialurin
www.sosialurin.fo

DANNY TRANSPORT
- tá okkurt skal koyrast ella goymast
Tlf. 319192